# - Vit hava brúk fyri fleiri semingsmonnum

Skjótt fyrrverandi semingsmaður, Suni Schwartz Jacobsen:

SEMINGSMAÐUR GEVST

*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Annar av semingsmonnunum hjá Semingsstovninum, Suni Schwartz Jacobsen, gevst sum semingsmaður 1.oktober. Vanlig mannagongd er, at semingsmenn verða settir í trý ár, og síðan verður støða tikin til, um teir skulu halda fram. 1. oktober er tíðarskeiðið hjá Suna Schwartz Jacobsen sum semingsmaður av, og hann hevur ongar ætlanir um at halda fram. Tað var heldur ongantíð ætlanin hjá Suna at verða semingsmaður longri enn hesi trý árini, og tí kemur tað valla óvart á nakran, at hann nú letur starvið frá sær.

Tað er einki dulsmál, at Suni varð hart trýstur undir samráðingunum í vár millum arbeiðarafeløgini og arbeiðsgevararnar. Fleiri høvdu at hansara leikluti undir sjálvum samráðingunum. Vit hava sett skjótt fyrrverandi semingsmanninum stevnu um eitt prát um samráðingarnar í vár, um støðuna á føroyska arbeiðsmarknaðinum og hvat hann heldur um uppskotið hjá landsstýrismanninum um loysn á trætum á føroyska arbeiðsmarknaðinum í framtíðini.



*Suni Schwartz Jacobsen hevur ikki stórvegis viðmerkingar til allar ábreiðslurnar, hann fekk undir samráðingum í vár. Hann er kortini ikki samdur øllum atfinningunum, sum vórðu førdar fram.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Støðan óbroytt

Undir drúgva verkfallinum á privata arbeiðsmarknaðinum í vár fekk Suni Schwartz Jacobsen nógvar ábreiðslur fyri sín leiklut undir samráðingunum. Ivi varð sáddur um hansara gegni, tí hann var bæði semingsmaður og arbeiddi sum granskoðari hjá arbeiðsgevararunum.

Tað varð eisini havt á tunguni, at semingsmenninir, Høgni Høgnesen og Suni sjálvur, gingu ov lítið millum partarnar, og vóru harvið við til, at verkfallið dróg so langt sum tað gjørdi. Arbeiðarafeløgini hartaðu eisini semingsmenninar fyri, at teir ætlaðu at steingja partarnar inni 1. mei, tá altjóða arbeiðaradagurin er. Spurningurin um uratkvøðuna vakti eisini stóran ans, og arbeiðarafeløgini góvu rættiliga ilt av sær og søgdu seg als ikki ganga við til eina uratkvøða sum semingsmenninir skutu upp.

Suni Schwartz hevði ikki stórvegis viðmerkingar til atfinningarnar í vár, og tann støðan er framvegis óbroytt. Til spurningin um hansara gegni vísir hann á, at hann á sinni varð valdur av eini nevnd, ið umboðaði báðar partar á arbeiðsmarknaðinum, og partarnir vistu fullvæl, hvør hann var. Tað var tí heldur óskiljandi, at tann eini parturin kom afturumaftur í vár, tá tey sjálvi, av fyrstani tíð, høvdu verið við til at seta hann í starvið sum semingsmann.

Hann er heldur ikki samdur í ábreiðslunum, at semingsmenninir gingu ov lítið millum partarnar, tí tað var so langt millum partarnar, at tað var rættiliga torført at bera seg øðrvísi at, tí krøvini hjá feløgunum vóru so ymisk.

Onkur hevur eisini havt á lofti, at semingsmenninir í samband við samráðingar í vár høvdu aðrar mannagongdir, enn teirra undangongumenn hava havt, og at tað tí kom fjáltur á partarnar undir samráðingunum, men tað hevur Suni Schwartz heldur ikki stórvegis viðmerkingar til. Hann sigur bert, at hann metir ikki teir bóru seg øðrvísi at, og leggur afturat, at møguliga hava aðrir semingsmenn nýtt aðrar mannagongdir, men støðan er ein onnur í dag, og tað er ein noyddur at fyrihalda seg til.

Spurdur, um samráðingar vóru øðrvísi fyri Semingsstovnin, nú arbeiðarafeløgini, fyri fyrstu ferð í eitt mannaminni, stóðu saman sum eitt felag, svarar Suni, at var eitt sindur øðrvísi. Hann heldur, at generelt verður tað helst lættari hjá Semingsstovninum í framtíðini at samráðast við arbeiðarafeløgini, tá tey standa saman, enn tá tey vóru spjødd.

### Gott við konstruktivum pørtum

Eftir trý ár í starvinum sum semingsmaður, hevur ein gjørt sær hollar royndir við at fáa partar, ið eru rúkandi ósamdir, at endiliga finna fram til eina felags semju. Suni Schwartz Jacobsen dylir ikki fyri, at tey trý árini hava rúmað bæði positivar og negativar løtur. Serliga positivt hevur tað verið, tá báðir partarnir eru komnir við uppbyggjandi uppskotum. – Tað eru partarnir sjálvir, sum skulu semjast, og ikki vit sum skulu noyða teir, men finst eingin semja, so er uppgávan hjá Semingsstovnurin at traðka til, sigur skjótt fyrrverandi semingssmaðurin.

Spurdur, um ávís feløg hava verið lættari at hava við at gera enn onnur, svarar Suni, at tað er rættiliga torført at generalisera.

– Hvussu samráðingar ganga er ofta treytað av, hvussu støðan er og hvørji krøv partarnir hava. Tíðin, ið er tøk, og hvussu væl fyrireikaðir partarnir eru spælir eisini inn, hvussu væl einar samráðingar ganga, greiðir Suni frá.

Suni leggur afturat, at tað eru ofta smáar misskiljingar, sum elva til stríð, og tá er tað ómetaliga týdningarmikið, at partarnir eru væl fyri fakliga. Spurdur, um hvat hann heldur um dygdina á sáttmálum hjá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum í dag, svarar hann, at flestu sáttmálarnir eru rímuliga ítøkiligir.

Hann vísir á, at í hansara tíð sum semingsmaður hevur hann altíð havt ta aðalreglu, at hann aldrin orðar ein fullkomiliga nýggjan sáttmála, men ger heldur nakrar smávegis broytingar frá teimum gomlu sáttmálunum.



### Skilagott við fýra semingsmonnum

Suni Schwartz Jacobsen letur sum heild væl at nýggja uppskotinum hjá Bjarni Djurholm um loysn á trætum á arbeiðsmarknaðinum. Hann vil ikki gera viðmerkingar til samlaða uppskotið, men heldur seg til broytingarnar, ið landsstýrismaður ætlar at gera viðvíkjandi Semingsstovninum. – Tað er gott fyri Semingsstovnin, at tað gerast fleiri semingsmenn, tí so kunnu teir taka sær av teimum økjum, ið teir hava mest kunnleika til, tí eingin ivi er um, at tað er rættiliga møtumikið hjá tveimum semingsmonnum at seta seg inn í allar sáttmálarnar, greiðir Suni frá.

Hann heldur eisini, tað er skilagott, at tað er lagt upp til, at Semingsstovnurin eisini skal fevna um almenna arbeiðsmarknaðin. Í síni tíð sum semingsmaður hevur tað av og á verið heitt á Semingsstovnin um at blanda seg í ósemjur á almenna arbeiðsmarknaðinum, men teir hava sýtt fyri tí, tí stovnurin metti seg ikki hava heimild til tað.

Suni Schwartz Jacobsen er einki fyri at taka dagar ímillum, hvørja lagnu uppskotið hjá Bjarna Djurholm fer at fáa. Hann sigur, at tá alt kemur til alt, so er tað ein politisk avgerð. Sjálvur metir hann, at tað kann verða óheppið at kroysta eitt uppskot yvir høvdið á pørtunum, tá tann eini parturin ikki ynskir tað. Hinvegin eru politikkarnir valdir til at taka avgerðir, so teir mugu sjálvir gera av, hvat er best fyri samfelagið

### Vantar saklig sjónarmið

Spurdur, um hann sær fyri sær nakrar týðandi broytingar á føroyska arbeiðsmarknaðinum í framtíðini, so sleppast kann undan øllum trætunum, ið hava eyðkent føroyska arbeiðsmarknaðin seinastu árini, svarar Suni, at tað er ringt at spáa um. – Arbeiðstakarar og arbeiðsgevarar eru í mongum førum viðspælarar, men tosað vit um løn, eru teir mótspælarar. Fær man broytt samarbeiðsháttin nakað, so at partarnir síggja seg meir sum viðspælarar, so kundi verið sloppið undan fleiri ósemjum, metir Suni Schwartz.

Tað er einki dulsmál, at seinastu árini hevur kjakið millum fakfeløgini og arbeiðsgevararnar stórliga verið merkt av, at partarnir halda fast um síni sjónarmið. Teir hava ilt við at koma víðari, so tær neyðugu broytingarnar á arbeiðsmarknaðinum verða framdar, sum báðir partar í roynd og veru ynskja.

Suni sigur seg ofta vanta nøkur saklig sjónarmið frá pørtunum, og ikki bara nøkur kenslulig og subjektiv sjónarmið. Hann heldur, at kjakið um uppskotið hjá Bjarna Djurholm hevur verið stórliga merkt av tí sama, og at partarnir hava rættiliga ilt við at koma úr gomlu skotbrøvunum, og bróta úr nýggjum

### Arbeiðsamboðini mugu kunna nýtast

Nú Suni Schwartz Jacobsen skjótt gevst sum semingsmaður, hevur hann eitt serligt ynski til Semingsstovnin. Hann heldur tað er ómetaliga týdningarmikið, at Semingsstovnurin fær brúkt tey amboð, stovnurin hevur fingið tillutað.

Í hesum sambandi kann nevnast uratkvøðan í vár, sum semingsmenninir skutu upp. Teir høvdu heimild til at senda eitt uppskot til uratkvøðu hjá limunum í arbeiðarafeløgunum, men í praksis bar tað illa til. Sum støðan er í løtuni, so eru tað felagið, ið hevur uratkvøðuna, sum sjálvt skal skipa fyri. Nevndirnar í arbeiðarafeløgunum sýttu fyri at skipa fyri uratkvøðu, og tískil fingu semingsmenninir lítið gjørt.

Suni heldur, at mannagongdin eigur í framtíðina at vera, at tað verður semingsstovnurin, sum skal skipa fyri uratkvøðunum. Hetta skal tryggja, at amboðini hjá stovninum ikki bara skulu rigga í teori, men eisini praksis.

Tá vit royna at spyrja hann, hví semingsmenninir í vár gjørdu av -heldur ótraditionelt at royna eitt semingsuppskot hjá limunum í arbeiðarafeløgunum, svarar Suni, at tað er hann ikki so áhugaður at gera viðmerkingar til.

*– Tit mugu væl hava havt illgruna um, at limirnir hjá arbeiðarafeløgnum ikki tóku undir við formonnunum?*

Tú kanst sjálvur gita tær til, hvat vit hava hugsað í tí støðuni. *Men er ikki nakað um tað?* Tað vóru komplisæraðar samráðingar, og meir vil eg ikki koma inn á tað, sigur Suni Schwartz Jacobsen at enda.

Hvussu hevur verið og ikki hesi trý árini, so er tað ein sannroynd, at Suni Schwartz Jacobsen hevur verið semingsmaður fyri seinastu ferð á hesum sinni. Næstu samráðingar á privata arbeiðsmarknaðinum verða millum Handverkararnar og Handverksmeistararnar, sum byrja 1. oktober. Kemur tað so langt, at neyðugt er, at Semingsstovnurin verður noyddur at leggja uppí, so verður tað uttan Suni Schwartz Jacobsen, sum takkar fyri seg 1.oktober.



*Um ein lítlan mánað gevst Suni Schwartz Jacobsen sum semingsmaður hjá Semingstovninum. Hann sigur seg vóna, at stovnurin fær nøkur amboð, hann veruliga kann brúka, tí royndirnar hava víst, at tað er munur á, hvat Semingsstovnurin kann í teoriini og so í praksis*

*Mynd: Savnsmynd*

# Club 20 letur aftur




*– Club 20 hevur verið sera væl vitjað øll hesi árini, men nú hevur tað tænt fyri seg, og vit fara um ein mánað at bjóða eitt spildunýtt stað fram, sigur Petur Olsen.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Sunnunáttina verður fyri seinastu ferð nakrantíð dansur í Club 20. Tað 15 ára gamla dansistaðið hevur tænt fyri seg, og tí verður tað nú stongt. Um ein mánað letur nýggjur náttklubbi upp í somu hølum**

CLUB 20

*Eyðun Klakstein*

Sunnunáttina fer kanska kendasta dansistaðið í landinum í søguna.

Tá ið fólk einaferð ímóti morgni eru rikin út, verður lykilin snaraður um fyri seinastu ferð í Club 20.

Dansistaðið hevur verið partur av náttarlívinum í Havn síðani 1989, og men nú er bara eitt vikuskiftið eftir.

– Club 20 hevur tænt fyri seg, og tí hava vit valt at steingja tað, sigur Petur Olsen, sum er stjóri.

– Vit síggja hinvegin møguleikar fyri einum nýggjum og øðrvísi náttklubba í somu hølum, og mánadagin fara vit undir umbyggingina til eitt nýtt stað, sigur hann.

### Skifta konsept

Club 20 man hava lagt høli til bæði eitt og annað hesi næstan 15 árini, tað hevur havt opið, og tað hava eisini verið skiftandi leiðarar og starvsfólk á dansistaðnum.

Í nógv ár var Páll Arge drívmegin, men hann hevur einki havt við Club 20 at gera í nógv ár nú.

Tað hevur hinvegin Petur Olsen, sum er stjóri, og hóast Club 20 fyri kortum bygdi eitt sindur um, skal tann heilt stóra broytingin nú gerast í hølunum.

– Vit fara at hava stongt í ein mánað, men tá ið vit so lata upp aftur, verður tað við einum heilt nýggjum náttklubba. Tað verður eitt nýtt navn, eitt nýtt konsept, og vit fara at hava strangt 21 ára aldursmark, sigur hann.

### Nýtt aldursmark

Club 20 hevur annars verið kent sum eitt stað, har tey ungu halda til, men við nú aldursmarkið verður flutt úr 18 og upp í 21 ár signaliserar staðið, at tað stílar eftir einum nýggjum málbólki.

Kappingin millum Club 20 og Platform, sum eru grannar í miðbýnum í Havn, er hørð, og hon verður neyvan minni, nú nýggjur náttklubbi skal bjóða seg fram.

Petur Olsen lovar, at fólk fara at fáa eitt heilt øðrvísi upplivilsi í nýggja klubbanum.

– Club 20 hevur verið sera væl vitjað øll hesi árini, og tað man neyvan vera nakað annað dansistað í landinum, sum hevur fingið slíka undirtøku. Men nú hevur tað tænt fyri seg, og vit fara um ein mánað at bjóða eitt spildunýtt stað fram, sigur Petur Olsen.